

# Greinari: Nú vil tørvurin á olju økja

**Jógvan Hugo Gardar**

20.10.2015 - 21:46

Oljan.fo

Oljugreinarin Thina Saltvedt heldur at vit nú eru farin at síggja at lági oljuprísurinnú ger seg galdandi, bæði tá talan er um eftirspurning og útboð.

Hesum er ein annar oljugreinari, Trond Omdal, í Pareto, samdur við henni í.

- Eftirspurningurin hevur ikki verið so høgur farnu fimm árini. Tað verður í løtuni seld næstan 1,9 milliónir føt um dagin, og tað er næstan fýra ferðir so nógv sum fyri einum ári síðani, tá 500.000 føt blivu seld um dag sigur Omdal, sambært Dagens Næringsliv.

Hetta hevur gjørt at altjóða orkuraðið í Paris nú hevur lagt fram nýggjar metingar, sum vísa at tørvurin á olju og gassi er øktur um allan heim.

Mett verður samstundis at oljuframleiðslan kemur at minka, og at hetta saman við hægri eftirspurnigi kemur at gera at oljuprísurin kemur at kvinka uppeftir.

Omdal sigur at tað tó framvegis er eitt sum ger at oljuprísurin ikki kemur at økja so nógv í vetur, og tað er at tað framleivis verður framleitt meir av olju enn tað marknaðurin klárar at svølgja.

Hetta farna árið hava OPEC-londini økt sína oljuframleiðslu við 1,5 milliónum føtum um dagin, og samstundis verður roknað við at Iran kemur at kunna bjóða eini 500.000 føt av olju um dagin, nú handilsforðingarnar eru strikaðar.

Amerikanska oljuframleiðslanvaks í farnu viku við 7,56 milliónum føtum, meðan greinarar høvdu mett at USA bara vildi økja framleiðsluna við 2,58 milliónum føtum.

Omdal sigur at javnvág neyvan kemur í oljumarknaðin fyrrenn um eitt ár, og hann heldur ikki at prísurin á Brent-oljuni neyvan kemur at halda seg omanfyri 60 dollarum fyrrenn einaferð í 2016.